JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE

## Áhugavert starv á Jarðfeingi

Ert tú verkfrøðingur, og hevur tú áhuga fyri orkuviðurskiftum?

JARÐFEINGI søkir eftir einum verkfrøðingi at byrja skjótast til ber.
Arbeiðið á stovninum er fjøltáttað. Vit samstarva og samskifta við nógv viðskiftafólk, myndugleikar og stovnar bæði her heima og uttanlands.

### VIT BJÓÐA

Nýggjur orkupolitikkur skal fremjast, og nýggj elveitingarlóg er samtykt. Vit fara tí undir at arbeiða miðvíst við orkupolitiskum átøkum, soleiðis at vit kunnu økja um gagnnýtsluna av varandi orkukeldum og seta orkusparandi tiltøk í verk.

Vit bjóða eitt nýtt starv á loyvis- og orkudeildini, har møguleiki verður at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við góðum eftirútbúgvingarmøguleikum, og har tú í stóran mun sjálv/ur fær ávirkan á og ábyrgd fyri at menna starvsøkið.

### ÚTBÚGVING OG ROYNDIR

Ynskiligt er, at tú hevur kandidatprógv frá hægri lærustovni umframt viðkomandi royndir.

Tú skalt kunna arbeiða bæði við yvirskipaðum evnum og praktiskum málum og hava góð evni at samstarva og at samskifta málsliga og skrivliga - eisini á norðurlendskum og enskum máli.

### LØNAR– OG SETANARTREYTIR

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigurð í Jákupsstovu, stjóra á Jarðfeingi, á telefon 357000 ella við telduposti til sij@jardfeingi.fo.

### UMSÓKNIR

Umsóknir við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu vera Jarðfeingi í hendi í seinasta lagi 15. august 2007.
Adressan er: JARÐFEINGI, Brekkutún 1, Postboks 3059, 110 Tórshavn.

JARÐFEINGI er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Endamál stovnsins er at fyrisita, granska, ráðgeva og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfeingi umfatandi hesar høvuðspartar: kolvetni, orku og jarðfrøðilig náttúruvirði.

Høvuðsuppgávurnar á Jarðfeingi eru:
a) Kolvetnismál, og sum partur av hesum at fyrisita lóggávu innan leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.
b) Orkumál, og sum partur av hesum at fyrisita lóggávu innan framleiðslu, flutning og veiting av orku.
c) Jarðfrøðiligar og náttúrulandafrøðiligar uppgávur innan gransking, ráðgeving, savnsvirksemi og undirvísing.

WWW.JARDFEINGI.FO




**Kunningarstovurnar kring landið**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | Tel. 302425 | Klaksvík | Tel. 456939 | Tvøroyri | Tel. 372480 | Skopun | Tel 361704 |
| Fuglafjørður | Tel. 444860 | Vágar | Tel. 333455 | Vágur | Tel. 374342 | Vestmanna | Tel 471500 |
| Runavík | Tel. 417060 | Sandoy | Tel. 361836 | Nólsoy | Tel 327060 | | |

## Bólkaleiðari og IP- og teletøkningar til Vinnutøkni

*"Tá ið nýggj tøkni kemur rullandi, eru vit annaðhvørt partur av trumluni ella partur av vegnum"*
- Steward Brand -



Føroya Tele er fremsta KST-fyritøka í Føroyum. Vinnutøkni myndar, saman við Teletøkni og Datatøkni, Rakstrardepilin, sum er tann parturin av FT Samskifti, ið hevur ábyrgd av øllum tøkniligum loysnum. Vinnutøkni hevur ábyrgd av øllum telefoni- og øðrum samskiftisloysnum til okkara vinnukundar.

Fyri at styrkja um tøkniliga samstarvið við vinnukundar okkara, sóknast vit eftir bólkaleiðara og IP- og teletøkningum, ið saman við okkara dugnaligu vinnutøknikarum skulu mynda Vinnutøkni framyvir.

**Felags fyri størvini er, at nýggju starvsfólkini**
- mugu duga væl at samstarva, arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd
- eru nærløgd og samstarvsfús
- eru fyrikomandi, og duga væl at tosa við kundar
- halda avtalur mótvegis kundum
- hava góðan kunnleika til enskt

**Bólkaleiðari**
Bólkaleiðarin fær ábyrgdina av starvsfólka- og fíggjarviðurskiftunum á Vinnutøkni, umframt at tryggja kundanøgdsemið.

**Arbeiðsinnihaldið er í høvuðsheitum:**
- yvirskipað samskipan av verkætlanum og starvsfólkaleiðsla
- at vera við til at leggja framtíðar ætlanir fyri nýggj vinnuprodukt hjá Føroya Tele

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving, ein ávísan tøkniligan kunnleika og áhuga fyri tøkniligum heildarloysnum.

Umsøkjarar við royndum innan leiðslu og kundarøkt hava fyrimun.

**IP & teletøkningar**
Í samstarvi við hinar tøkningarnar í Vinnutøknibólkinum, skulu nýggju IP-tøkningarnir veita, reka og viðlíkahalda telefoniskipanir og IP-telefoniloysnir og tilhoyrandi nýtsluskipanir hjá kundum okkara.
Umsøkjarar skulu vera telduatstøðingar ella hava aðra viðkomandi útbúgving, og umsøkjarar við royndum innan IP-telefoni og SIP hava fyrimun.

Vit bjóða eitt starv við góðum møguleikum fyri víðariútbúgving, í einum framtakshugaðum og mennandi umhvørvi.

Neyvari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hjallgrím P. Hentze, depilsleiðara á tel 303401

Størvini verða lønt sambært avvarandi sáttmála.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 13. august 2007 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
ft@ft.fo

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*